gult20 cyan20 magenta20 svart20

Hósdagur 26. apríl

SVF

18.30 Pinkupól 8
18.35 Jumanji 13
19.00 Sváviuldósin
19.10 Ferðin – eitt tónleikaverk eftir Sunleif Rasmussen
20.00 Dagur og Vika við Grannum okkara
20.50 Ferðaliðið – donsk dramarød
21.50 Vald andanna – donsk dokumentarrød
22.30 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 2:2 – ensk rød
23.25 Liðugt

EUROSPORT

07:30 Weightlifting
09:30 Car Racing
10:00 Football
12:00 Weightlifting (Live)
13:30 Car Racing
14:00 Tennis (Live)
15:30 Weightlifting
16:30 Weightlifting (Live)
17:30 News
17:45 Weightlifting (Live)
18:30 Football (Live)
19:15 News
19:30 Football (Live)
20:15 Football
22:00 News
22:15 Football
00:15 News
00:30 Close

BBC PRIME

00.00 Tlz Darwin
01.00 Tlz Stephen Hawking's Universe
02.00 Tlz Ou D316
02.30 Tlz Ou Mdst242
03.00 Tlz Ou S324
03.30 Tlz Ou Crunch
04.00 Tlz Workers At War
04.30 Tlz Spanish Fix
05.00 Tlz Landmarks: Tropical Rainforests
05.30 Tlz Kids English Zone
06.00 Jackanory
06.15 Playdays
06.35 Blue Peter
07.00 Aquila
07.30 Ready Steady Cook
08.15 Style Challenge
08.40 Real Rooms
09.05 Going For A Song
09.30 Vets To The Rescue
10.00 The Antiques Show
10.30 Tlz 1914-1918: The Great War
11.20 Antonio Carluccio' S Southern Italian Fe
11.50 Ready Steady Cook
12.35 Style Challenge
13.00 Doctors
13.30 Classic Eastenders
14.00 Real Rooms
14.30 Going For A Song
15.00 Jackanory
15.15 Playdays
15.35 Blue Peter
16.00 Aquila
16.30 Top Of The Pops Plus
17.00 Antiques Roadshow
17.30 Doctors
18.00 Eastenders
18.30 Passport To The Sun
19.00 Keeping Up Appearances
19.30 2 Point 4 Children
20.00 King Lear
21.40 From Russia With Spreadlove
22.10 Parkinson
23.10 Dalziel And Pascoe

BBC WORLD

00.00 BBC News
00.30 HARDtalk (r)
01.00 BBC News
01.30 Holiday (r)
02.00 BBC News
02.30 Reporters (r)
03.00 BBC News
03.30 Asia Today (r)
03.45 World Business Report (r)
04.00 BBC News
04.30 HARDtalk (r)
05.00 BBC News
05.30 Top Gear (r)
06.00 BBC News
06.30 Reporters (r)
07.00 BBC News
07.30 HARDtalk
08.00 BBC News
08.30 Talking Movies (r)
09.00 BBC News
09.30 The Money Programme (r)
10.00 BBC News
10.30 HARDtalk (r)
11.00 BBC News
11.30 Holiday (r)
12.00 BBC News
12.30 The Money Programme (r)
13.00 BBC News
13.30 HARDtalk (r)
14.00 BBC News
14.15 World Business Report
14.30 Top Gear (r)
15.00 BBC News
15.30 The Money Programme (r)
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Click Online
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
22.00 BBC News
22.30 Life
23.00 BBC News
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

3 VIASAT

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 Garfield og venner
07:35 TV-shop
09:00 Sunset Beach
09:50 Træneren
10:20 Horton-sagaen (G)
11:10 Horton-sagaen
12:00 Melrose Place - classic
12:55 Vild med dig
13:25 Panter-tanter
13:55 Xena - amazonekrigeren
14:45 Baywatch
15:40 Min kære familie
16:10 Ricki Lake
17:10 Dagens Nyheder på TV3
17:30 Baren (G)
18:00 Alle tiders barnepige
18:30 Baren
19:00 GRISK - når det gælder
20:00 Skjulte Spor
21:05 Heksene fra Warren Manor
22:00 Baren (G)
22:30 Dagens Nyheder på TV3
22:45 Vore værste år
23:15 Simpsons
23:45 Ti tommelfingre
00:15 Michael Hayes
01:10 Kojak
02:10 I lyst og nød
02:40 Drøm videre
03:05 Ricki Lake (G)
04:05 Godnat

ÚTVARP FØROYA

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlesturin Carl Jóhan Petersen á Sandi lesur
07.15 Barnaløtan Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Morguntónleikur
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Morgunrásin
09.50 Morgunlesturin Carl Jóhan Petersen á Sandi lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fyrrapartsløg Kim Hansen stílar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Ferðin til Zambora (e) Hans Tórgarð lesur 9. part av framhaldssøgu eftir Annfinn í Skála.
11.30 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Dagurðatónar
13.00 Í grannalagnum (e) Óluva Zachariasen stílar fyri
13.30 Tónleikur
14.00 Kjaktorgið (e) Helgi Jacobsen leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Frívaktin Sending við tónleiki og práti um sjómansliv. Elis Poulsen skipar fyri
16.00 Tíðindi
16.03 Kári Annand Berg spælir tónleik
17.00 Tíðindini
17.05 Í Vingarðinum Victor Carlsen leggur til rættis
18.05 Barnaløtan (e) Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Harmonikutónar Flóvin Jacobsen skipar fyri
20.30 Á sanganna veingjum Gunnvør Poulsen stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur Ginna Midjord skipar fyri
22.00 Rák Anita Ottosen stílar fyri
23.00 Tíðindi

Skjulte Spor (16)

– Donsk dramarød

Ein kendur ummælari av list verður funnin deyður í íbúð síni. Hálshøgdur og settur upp sum eitt andstyggiligt listaverk. Sama dag letur ein listaframsýning upp, hvørs høvuðslistaverk fær løgregluna upp í leikin.Tað er ein málningur av einum hálshøgdum manni – eins og tann myrdi ummælarin.

Illgruni er beinanvegin um tann gíriga eigaran av listaskálanum, Bo, men tann áhugaverdasti persónurin er Ulf, sum hevur málað myndina. Ulf er autistur, og hann er tí í eini aðrari verð. Tað krevur ein dugnaligan sálarfrøðing at fáa Ulf at tosa. Men hvør er tað? Henriette kennir seg hótta av nýggja arbeiðsfelaganum Victor, og hon ger tí alt fyri at fáa hesa uppgávuna.

Gívrarnar frá Warron Manor

– Amerikansk dramarød

Piper fær knappliga eina gátuføra og ólekjandi sjúku. Tí bróta hennara tvær systrar sítt lyfti um, at tær ongantíð skulu nýta gandamegi sína til egnan vinning.

Piper verður frísk, men av tí at systrarnar hava brotið sítt lyfti, eru allir hinir sjúklingarnir á sjúkrahúsinum vorðnir smittaðir av tí ólekjandi sjúkuni.

Rás 2 FM 102 FM 107

10:45 Orðið Bibliulestur v/ Anju Hansen
11:00 Birgir Beinleiðis Birgir Sondum við gesti
12:00 Tíðindi & Lýsingar
13:00 Leysaløtan Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi og lýsingar
15:15 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Laila Beinleiðis Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
17:00 Norðlýsið! Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
18:00 Tíðindi og lysingar
18:15 Lættur tónleikur
19:00 Orð á leiðini EVR-sending "Hvussu Jesus myndar heimssøguna". Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og lýsingar
21:15 Orðið (e) Bibliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Girlzone Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo

Lindin

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
17.00 Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð
18.05 The Finishing Touch ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 The Finishing Touch heldur fram
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum.
20.55 Dagsins Orð
21.00 Bønarlinjan við gesti. Bønarevni kunnu ringjast inn frá 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 Vertur tykkara hesarferð: Jenis av Rana.

Vit gevast uml. middnátt

gult21 cyan21 magenta21 svart21

– Eg kann ikki altíð vakja fólk aftur til lívs, sigur Teresia Wairimu. Tað er bert í eini desperatari støðu, har eg havi brúk fyri einum unduri. Eg má fáa orðið frá Gudi, sigur hon

Heimskendur evangelistur í Føroyum

Birita Andreasen

Komandi vikuskiftið skipar evangeliska samtakið, Karisma, fyri eini fundarrød í høllini í Runavík. Høvuðstalarin verður tann heimskendi evangelisturin, Teresia Wairimu, úr Kenya.

Hon var ein av hundrað túsund, sum fyri trettan árum síðani vóru drigin til Uhuru lundina í Nairobi fyri at hoyra Guds tíðindi og síggja, hvat tey førdu við sær.

Guds kraft varð staðfest ígjøgnum Reinhard Bonnke við at syndarar, sjúk og bundin vóru sett í frælsi. Teresia Wairimu hevði ikki droymt um, at slíkt kundi henda, men táið hon sá hetta við egnum eygum, bað hon eina stilla bøn. Gud hoyrdi hana, og svaraði bønini langt út um tað,ið hon, ella nakar annar, hevði droymt um.

Vekingin í Nairobi vakti í henni eitt ósløkkjandi ynski. Men fimm ár gingu, áðrenn hon aftur hitti evangelistin Reinhard Bonnke. Hon ferðaðist alla ta langu leið frá Nairobi til Oslo í Noregi, fyri at hitta hann, men tann langi teinurin hevði onki at siga í mun til hennara longsul eftir Gudi.

Har legði evangelisturin hondina á hana, og Guds kraft rakti hana eins og snarljós.

Teresia Wairimu longdist eftir at tæna Gudi, og fór at hava møtir í heimbygdini. Eini fimm fólk komu til fyrstu møtini. Vikuna eftir komu fimmti. Fimmti blivu til hundrað og fimmti. Hópurin vaks, og trupulleikin við at finna hølir samsvarandi.

At enda fekk hon loyvi at hava møti í Uhuru lundini, sum er eitt tjóðareyðkenni,ið bert hægstu politisku myndugleikarnir sleppa at nýta. Har prædikar hon nú hvønn sunnudag.

Vakir fólk frá deyðum

Teresia Wairimu prædikar og biður fyri fólki. Undur henda í hópatali, og fleiri enn 1000 AIDS sjúk menniskju kunnu í dag vísa á, hvussu tey eru grødd. Eisini eru mong vakt til lívs aftur frá deyðum.

Tann herviliga sjúkan, AIDS, breiðir seg ómetaliga skjótt í Afrika, har trupulleikin er størri enn nakra aðrastaðni í heiminum. Teresia Wairimu kemur tí eisini í samband við fleiri av teimun sjúku undir hennara mongu møtum. Øll tey menniskjuni,ið hon hevur grøtt, hevur hon prógv uppá. Hetta er skipað soleiðis, at eina tíð, eftir at tey eru grødd, sendir hon tey aftur til lækna. Soleiðis goymir hon øll skjøl,ið prógva, at ein persónur fyrst var positivur til síðani at vera negativur.

Hon sigur eisini frá ymiskum tilburðum, har hon hevur virkað sum Guds amboð til at vakja fólk aftur frá deyðanum. Ein av teimum var, táið ein lítil drongur bleiv trampaður til deyðis undir einum møti. Hon sigur, at drongurin var smurdur inn í blóð, tá ið hjálparfólk hennara fingu fatur á honum. Tá visti hon, at um drongurin doyði, so fór tað at vera tað einasta, ið fjølmiðlarnir fóru at skriva um. Fólk vaktu yvir tí deyða drongininum í 7 tímar, til hann vaknaði aftur.

– Eg kann ikki altíð vakja fólk aftur til lívs, sigur Teresia Wairimu. Tað er bert í eini desperatari støðu, har eg havi brúk fyri einum unduri. Eg má fáa orðið frá Gudi, sigur hon.

Ferðast kring heimin

Evangelisturin Teresia Wairimu hevur ferðast kring allan heimin. Hon hevur verið runt í Afrika, Asia, USA og Europa. Nú er hon so komin til Føroyar, sum er eitt sera lítið land, samanborið við, hvar hon hevur ferðast. Til hetta sigur hon, at hon vildi elska at sæð tann longsulin sum afrikanarir hava til Gud, í Europa.

Hon útihýsir ikki møguleikan fyri, at vit eisini fara at síggja onkran blíva grøddan. Hon sigur, at tað er ikki neyðugt at vera trúgvandi fyri at bíva grøddur.

– Í ymsum londum ger Gud ymisk ting, sigur hon. Og so leggur hon dent á, at tað er ikki hon,ið grøðir nakran. Jesus ger tað, sigur hon.

Fyrireikararnir siga seg vænta nógv fólk til møtini í Runavík. Føroyingurin, Bergur Skovgaard, og danin, Jens Garnfeldt, fara at luttaka á møtunum.

Fundarrøðin byrjar fríggjakvøldið kl. 19.00 og heldur áfram leygardagin kl. 10.00 og kl. 19.00. Sunnudagin verður morgunmøti kl. 11.00 og kvøldmøti kl. 18.00.

Teresia talar á kvøldmøtunum, meðan Bergur Skovgaard og Jens Garnfeldt tosa á fyrraparts møtunum. Í samband við kvøldmøtini koyrir bussur av Farstøðini í Havn kl. 17.30 fríggjakvøld og leygarkvøld og sunnukvøldið kl. 16.30.

Farið verður aftur til Havnar fríggjakvøld og leygarkvøld kl. 23.00 og sunnukvøld kl. 22.00.

Eftir Føroyavitjanina fer Teresia til Danmarkar at hava møtir í Svendborg og í Aalborg.